## Oydd korallriv

Kanningar hjá norskum lívfrøðingum vísa, at millum 30 og 50 prosent av øllum koralløkjunum í norskum sjógvi eru oyðiløgd ella hava fingið stóran skaða. . Lívfrøðingarnir eru ikki í iva um, at tað eru trolararnir, sum eru syndararnir, og teir mæla tí reiðaríunum til at skifta frá botntroli til flótitrol. Men tað er lættari sagt enn gjørt, tí sum er hava trolararnir ikki loyvi til at fiska tosk, hýsu og upsa við flótitroli.



## Koyrd í skúla



Ein kanning hjá norska ráðnum fyri ferðslutrygd, Trygg Trafikk, vísir, at meiri enn 40 prosent av teimum norsku skúlabørnunum verða koyrd í skúla, sjálvt um teinurin í nógvum førum bara er nakrar fáar hundrað metrar. Tað er óheppið fyri børnini bæði so og so. Trygg Trafikk ger vart við, at 20 prosent av luftdálkingini í Noregi stavar frá bilunum, og tí vil stovnurin hava foreldrini til at lata børnini ganga ella súkla í skúla.

### STUTT SAGT



**Suðuroyingar mistu streymim**

Klokkan hálvgum ellivu sunnukvøldið mistu øll Suðuroyggin streymin og hann var burtur í ein góðan tíma. Av SEV verður sagt, at eitt tekniskt brek við køliskipanini á motorunum í Vági var orsøkin, men tað er loyst aftur nú.

**Størsti parturin í dagrøkt**

í 2005 vóru 1.898 børn í aldrinum 0-3 ár í ansing á dagstovnum/dagrøkt, tað er 66% av fólkatalinum í tí aldursbólkinum. Í aldrinum 4-6 ár vóru 1.768 børn ansing á dagstovnum/dagrøkt tað er 85% av fólkatalinum í tí aldursbólkinum.

**Maria og Jákup eru vanligastu nøvnini**

Visti tú, at vanligastu gentunøvnini, á teimum sum vóru føddar í 2005, vóru Maria, Vár, Bjørk, Rakul., Beinta, Birita, Emma og Eva?

Visti tú, at vanligastu dreingjanøvnini, á teimum sum vóru føddir í 2005, vóru Jákup, Jógvan, Markus, Brandur, Heini, Jón, Julian og Símun?

*Kelda: www.hagstova.fo*

Finnur Helmsdal, løgtingsmaður:

# John Johannessen var vælkomin við

**- Tað allar besta hevði verið at fingið fleiri tingfólk at leggja málið um at fáa samkyndum innivist í revsilógini fram. Javnaðarflólk o. o. vóru vælkomin við, men vit fréttu einki aftur frá teimum, sigur Finnur Helmsdal**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Tað passar ikki, at Tjóðveldisflokkurin hevur noktað John Johannessen og øðrum tingmonnum at vera uppskotstilarar saman við Tjóðveldisflokkinum. Hatta er loddrøtt lygn!

So avgjørdur er Finnur Helmsdal, løgtingsmaður, tá vit biða hann um eina viðmerking til tað, sum John Johannessen segði við Sosialin í fríggjadagin. Tá segði John Johannessen, at hann saman við floksfeløgunum Kristiani Magnussen, Andrias Petersen og Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum bjóðaðu sær til at vera meduppskotstillarar saman við tjóðveldistingfólkunum í málinum um at fáa samkyndum innivist í nógv umrøddu revsilógarparagraffini.

John Johannessen segði við Sosialin, at Tjóðveldisflokkurin allarhelst vildi koyra málið solo fyri at fáa uppmerksomheit.

Finnur Helmsdal sigur, at tað er rætt, at John Johannessen ringdi bæði til sín og Høgna Hoydal um hetta málið og spurdi, um allir teir stóru flokkarnir kundu leggja málið fram í felag.

- Vit hildu hetta vera eitt frálíkt uppskot og avtalaðu, at John Johannessen skuldi



ringja aftur, men vit hoyrdu hvørki orð ella eið frá honum, sigur Finnur Helmsdal.

Finnur Helmsdal dylur ikki fyri, at hann er sera skuffaður av tí, sum John Johannessen sigur í Sosialinum, tí sjálvandi vildu tey hava so nógv tingfólk við sum gjørligt, tí tað gevur málinum størri møguleikar at verða samtykt.

Hann sigur eisini, at hann – tá málið var fyri í fjør – fleiri ferðir lá á knøunum fyri Kristiani Magnussen, formanni Javnaðarfloksins á tingi, fyri at fáa Javnaðarflokkin at vera við.

- Tá var svarað, at málið hevði ikki nóg stóran týdning til at skapa órógv í Javnaðarflokkinum, sum ikki var samdur í hesum máli, sigur Finnur Helmsdal.

# Vil gera alt fyri at fremja málið

**Hóast John Johannessen, løgtingsmaður Javnaðarfloksins stendur fast við, at Tjóðveldisflokkurin ikki vildi hava hann og onnur tingfólk við sum uppskotsstillarar til málið í samband við samkynd, so vil hann kortini slætta sjógv og stuðlar málinum av fullum huga**



POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Mítt ynski er, at uppskotið hjá Finni Helmsdal og Annitu á Fríðriksmørk um at geva teimum samkyndu innivist í antidiskriminatiónsparagraffini, verður samtykt. Hóast eg standi fast við, at vit fýra, Poul Michelsen, Kristian Magnussen, Andrias Petersen og eg sjálvur, ikki sluppu at vera við sum uppskotsstillarar, so vil eg kortini geva uppskotinum mín fulla stuðul.

Hetta sigur John Johannessen, eftir at Finnu Helmsdal fyrr í dag kallaði tað eina loddrætta lygn, tá John Johannessen í Sosialinum í gjár segði, at Tjóðveldisflokkurin hevði nokta teimum at vera við sum uppskotstillarar.

- Nú tosi eg bara fyri meg sjálvan, tí eg havi ikki tosað við hinar, men eg vil gera alt fyri at hetta týdningarmikla málið ikki verður gruggað, sigur John Johannessen, sum leggur dent á, at hendan ósemjan millum hann og Finn Helmsdal ikki skal forða málinum at verða samtykt.

- Eg vil gera alt fyri at málið verður samtykt, sigur hann.

*- Eg vil gera alt fyri at uppskotið hjá Finni Helmsdal og Annitu á Fríðriksmørk verður samtykt, sigur John Johannessen*

# »Den eneste bøsse på Færøerne«

SAMKYND

Politiken valdi í gjár at seta Føroyar á forsíðuna á sunnudagsútgávuni, har brot úr kjakinum um samkynd verða endurgivin.

Yvirskriftin á forsíðuni er "Den eneste bøsse på Færøerne", og staðfest verður, at í Føroyum er loyvt at hótta, spotta og niðurgera samkynd.

Forsíðugreinin tekur støði í einum átjan ára gomlum samkyndum dreingi, sum sambært Politiken er annar av tveimum samkyndum mannfólkum í Føroyum, sum alment viðganga, at teir eru samkyndir. Síðani verða brot úr tí mangan bonska kjakinum um samkynd endugivið. M.a verður løgtingsmaðurin Jenis av Rana endurgivin fyri at siga, at "I det Ny Testamente står der kort og godt, at homoseksuelle ikke kan arve Guds rige".



*Løgtingið er einasta parlament í norðurlondum, sum enn ikki við lóg hevur valt at verja samkynd móti diskriminatión, og hetta tykjast útlendskir fjølmiðlar eftir øllum at døma at geva gætur*